# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

## 11. september 2001

**08.46:** Eitt flogfar rennur á tað norðara tornið í World Trade Center í New York.

**09.03:** Eitt annað flogfar rennur á tað syðra tornið.

**09.05:** George W. Bush, forseti, sum vitjar barnaskúlan í Sarasota í Florida, verður kunnaður um tað, sum er hent.

**09.30:** Bush tosar við fjølmiðlarnar og umrøður tilburðin sum eina landsvanlukku, og at talan helst er um yvirgang.

**09.37:** Eitt triðja flogfar rennur á verjumálaráðið Pentagon. Alt starvsfólkið verður flutt úr Pentagon, Hvítu Húsunum og Kongressini.

**09.55:** Bush fer úr Florida og skal til Washington, men eftir eina hóttan ímóti forsetaflogfarinum lendir flogfarið í Barksdale í Louisiana. Haðani flýgur tað til Nebraska og síðani til Washington.

**09.59:** Tað syðra tornið í World Trade Center rapar.

**10.03:** Eitt fjórða flogfar dettur niður nærhendis Pittsburg, eftir at ferðafólkini hava roynt at taka flogrænararnar av ræði. Flogfarið skuldi til Washington.

**10.28:** Tað norðara tornið í World Trade Center rapar.

**12.16:** Loftferðslumyndugleikarnir steingja allar sivilar flogvallir í USA.

**13.04:** Í einari røðu vissar Bush amerikanska fólkið um, at øll neyðug stig eru tikin.

**13.27:** Stjórnin lýsir undantaksstøðu í Washington DC.

**20.30:** Forsetin heldur røðu, har hann lovar at jagstra teir seku og øll, sum veita teimum skjól.

# Fimm ár sum hava broytt USA



**Fyri fimm árum síðani vóru amerikanararnir skelkaðir og tóku seg saman. Í dag eru teir illir og spjaddir**

„Let's roll" sang Neil Young í 2001 í einari tjóðskaparligari heilsan til ferðafólkini, sum eftir øllum at døma forðaðu fyri, at flogrænararnir kundu renna flogfar nr. 93 hjá United Airlines inn í Hvítu Húsini ella Kongressina. Ístaðin fyri datt flogfarið niður í Pennsylvania.

„Let's impeach the president" - latum okkum seta forsetan fyri ein ríkisrætt - syngur sami Neil Young í 2006 á einari fløgu, har hann mótmælir krígnum í Irak.

Tað er ikki bara sangarin, sum hevur broytt hugsan hesi fimm árini síðani 11. september í 2001. Tvørturímóti loysir hetta gongdina í amerikonskum politikki og fólkahugsanini í hesum tíðarskeiðinum. Teir fyrstu dagarnar aftan á atsóknina fekk forsetin stuðul frá 90 prosentum av fólkinum, og tað var eingin, sum talaði ímóti hansara tiltøkum, sum skuldu forða fyri yvirgangi.

Nú fimm ár seinni er støðan ein onnur. Í dag eru tað bara 31 prosent av amerikanarunum, sum styðja forsetan, og á politiskt hava amerikanararnir sjáldan verið so ósamdir sum nú. Men hví?

### Aftur til tað gamla

Tvey nøvn lýsa ein stóran part av frágreiðingini. Tey eru Irak og Katrina. Kríggið í Irak kann gerast eitt nýtt Vietnam fyri USA, og tropiska ódnin Katrina sópaði burtur uppfatanina millum amerikanarar av Bush sum einum manni, ið visti, hvussu ein kreppa skal loysast.

– Nógvir amerikanarar halda, at tey tiltøkini, sum Bush hevur sett í verk ímóti yvirgangi, hava kostað ov nógv, og at úrslitini eru ov fá og ov smá. Kríggið í Irak er ovurhonds dýrt og hevur ikki gingið serliga væl. Fyrr váðaði andstøðan sær ikki at mæla ímóti krígnum í Irak, men í dag vinnur andstøðan undirtøku við at finnast at krígnum, sigur svenski USA-serfrøðingurin Anders Hellner.

Í heyst er kongressval í USA, og júst avrik forsetans í sambandi við kríggið í Irak eru í ferð við at gerast høvuðsevnið hjá demokratunum í valstríðnum. Ein skyggjandi andsøgn við ta landsumfatandi undirtøkuna, sum forsetin fekk tey fyrstu árini aftan á atsóknina fyri fimm árum síðani.

– 11. september gjørdi, at fólk fingu eina uppfatan av einum sameindum USA, men í veruleikanum vóru amerikanararnir ikki so samdir kortini. Nú byrja stríðsmálini at koma undanaftur, so vit fáa ta gomlu myndina aftur, sigur norski USA-serfrøðingurin Svein Mellby.

*(Kelda: Dagsavisen)*



*Amerikanararnir stóðu saman, tá tað ráddi um at leypa á Irak, men tann tíðin er farin*

# Heiðra flogrænararnar

**Á fimm ára degnum fyri atsóknina at USA heiðrar ein islamistisk heimasíða yvirgangsmenninar.**

Í gjárkvøldið nýtti ein islamistisk heimasíða høvi til at minnast tað, sum hendi fyri fimm árum síðani, men út frá einum heilt øðrum sjónarhorni, enn miðlarnir í Vesturheiminum gera.

Á heimasíðuni bar til síggja ein 19 minuttir langan film við myndum frá tí, sum hendi tann 11. september í 2001. Eitt nú vóru seintgangandi myndir, sum vísa tey bæði flogførini á veg inn í tornini í World Trade Center, og aftanfyri hoyrist onkur rópa „Allah Akbar" (Guð er stórur).

Á filminum hoyrist Osama bin Laden lesa nøvnini á teimum 19 flogrænarunum, meðan hann vælsignar teir ein og ein.

Sagt verður, at filmurin er gjørdur til heiðurs fyri flogrænararnar og atsókn teirra, sum kostaði næstan 3.000 amerikanarum lívið.